# Týr nummar eitt í Íslandi



**Týr er ovast á íslendska hittlistanum við útgávuni av ”Wild Rover” og til ber at vitja listan og atkvøða**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Týr hevur farnu vikuna ligið ovast á íslendska hittlistanum við ”Wild Rover”. Listin er soleiðis, at íslendskir ungdómar og skúlabørn atkvøða og minnir hetta tí ikki sørt um ”15 tær bestu” í Útvarpi Føroya.

Atkvøðast kann um 3 yndisløg um vikuna. 10 teir bestu dámdu sangirnir verða spældir á útvarpsrásum mikudag. Fyri at koma innar á topp 10 skal eitt lag fáa minst 100 atkvøður og fyri at gerast nummar eitt krevjast minst 400 atkvøður. 20 løg eru á løg á listanum.

Listin byrjar av nýggjum mánadag og til ber at atkvøða, um ein vitjar www.samfes.is/utvarp/-vinsaeldalisti . Merk 3 løg og trýst skrá niðast á síðuni.

Týr hava havt síðstu konsertina á íslendsferð teirra hesaferð og ummælini eru góð. Teir eru aftur á ferð í Íslandi tann 11. desember og spæla tá í Bog Nasa Hall í Reykjavík.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av eystri, um kvøldið lækkar hann niður í landsynning og minkar vindin nakað. Stundum regn og hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av landsynningi, um kvøldið upp í hvassan vind av útnyrðingi. Stundum regn ella ælingur og hitin millum 4 og 7 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi og suðri, um kvøldið veksur hann vindin av landsynningi. Sólglottar, men eisini okkurt ælið, partvís vátaslettingur og hitin millum 3 og 6 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin strúkur í vindi av útsynningi og ælingur, sunnudagin upp í hvassan vind av eystri og regn. Hitin millum 4 og 8 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -4 |
| Nuuk | -4 |
| Qaqortoq | -2 |
| Ammassalik | -2 |
| Saint John's | 2 |
| Halifax | 5 |
| Reykjavík | 1 |
| Seyðisfjørður | 2 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 3 |
| London | 8 |
| Tromsø | -2 |
| Bergen | 4 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | -1 |
| Keypmannah. | 3 |
| Helsinki | -2 |
| Moskva | 4 |
| Berlin | 12 |
| Warzawa | 10 |
| Kiev | 2 |
| Bukarest | 5 |
| Paris | 12 |
| Madrid | 8 |
| Róm | 18 |
| Malorca | 17 |
| Athen | 18 |
| Malta | 21 |
| Tunis | 23 |
| Beijing | 1 |
| New Dehli | 21 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | -- |
| New York | 12 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 15 |
| Meksikobýur | 17 |
| Panama | -- |
| La Paz | 16 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 22 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 974 hPa. í landnyrðing úr Íslandi fer norðureftir. Eitt lágtrýst tekur seg upp í útsynning úr Írlandi og fer móti Skotlandi og dýpist.




**Í dag:**
Eitt djúpt lágtrýst, 970 hPa. við Skotland fer spakuliga norðureftir og gevur eitt skifti nógvan vind á okkara leiðum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 24/11 kl. 06[00]– 25/11 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 5,9°
Minsti hiti máldur í nov.: ÷7,2° Mesti hiti máldur í nov.: 12,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 19,0 mm – mált frá 24/11 kl. 06[00]–25/11 kl. 06[00]
Avfallið higartil í november: 111,2 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

23. november: Tendring/Mánin næstur jørðini
30. november: Fyrra kvarter
7. desember: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2003

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 26. nov | 08.20 | 20.52 | 07.20 | 19.52 | 07.35 | 20.07 | 10.20 | 22.52 | 11.20 | 23.52 | 06.35 | 19.07 | 05.35 | 18.07 | 08.35 | 21.07 | 09.35 | 22.07 | 08.05 | 20.37 | 09.20 | 21.52 |
| 27. nov | 09.22 | 21.53 | 08.22 | 20.53 | 08.37 | 21.08 | 11.22 | 23.53 | — | 12.22 | 07.37 | 20.08 | 06.37 | 19.08 | 09.37 | 22.08 | 10.37 | 23.08 | 09.07 | 21.38 | 10.22 | 22.53 |
| 28. nov | 10.20 | 22.48 | 09.20 | 21.48 | 09.35 | 22.03 | — | 12.20 | 00.53 | 13.20 | 08.35 | 21.03 | 07.35 | 20.03 | 10.35 | 23.03 | 11.35 | — | 10.05 | 22.33 | 11.20 | 23.48 |
| 29. nov | 11.13 | 23.38 | 10.13 | 22.38 | 10.28 | 22.53 | 00.48 | 13.13 | 01.48 | 14.13 | 09.28 | 21.53 | 08.28 | 20.53 | 11.28 | 23.53 | 00.03 | 12.28 | 10.58 | 23.23 | — | 12.13 |
| 30. nov | — | 12.15 | 11.15 | 23.52 | 11.30 | — | 01.38 | 14.15 | 02.38 | 15.15 | 10.30 | 23.07 | 09.30 | 22.07 | — | 12.30 | 00.53 | 13.30 | — | 12.00 | 00.38 | 13.15 |

# Jólahugni í viðarlundini



JÓLAHUGNI
*Tíðindaskriv*

Tað er longu langt síðan, at fyrstu lýsingarnar boðaðu frá, at jólini vóru í mánd, og nú líður so mikið, at árligi jólahugnin hjá Lions verður komandi sunnudag, fyrsta sunnudag í atvent.

Seinastu 15 árini hevur Lions Club Tórshavn á hvørjum ári havt jólahugna í Viðarlundini í Havn, har ið bæði børn og vaksin hava eina hugnaløtu saman og kenna á sær, at jólastemningurin nærkast so spakuliga.

Í tíðarskeiðnum kl. 14-16 kunnu fólk keypa tilfar til jóladekoratiónir, um tey ætla at gera tær sjálv, men samstundis ber eisini til at keypa lidnar dekoratiónir.

Somuleiðis fæst til keyps ein drekkamuður við onkrum afturvið, og hóast nakrar vikur eru eftir til jóla, so vitja jólamenn, sum hava okkurt við til børnini.

Jólatónleikur verður eisini á skránni; m.a. fara limir í Havnar Hornorkestri at spæla jólaløg.

Ágóðin av tiltakinum fer allur til góðgerandi endamál., sigur Lions Club Tórshavn í tíðindaskrivi.




5 707265 100036 >